Um wc kummur høvdu ein telduskíggja og eitt knappaborð, har sum knappurin er at skola niður við, høvdu so øll sitið umvent á kummuni og Facekukka?
**Maður, 34 ár**

# Miðlamjarr

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



Vit vóna, at vit innan fá ár kunnu verða fremstir innan intima kosmetiska røkt í heiminum.
Hans Fróði Hansen, maðurin aftan fyri BYB-vørurnar, hevur mót uppá tað (Portal.fo)



„Eg fái at vita, at eg eri lekkur, men eg havi ikki tíð at svara øllum.
Danski X-Factor sangarin Sarah, sum er samkynd, er blivin kend (Se & Hør)



Í gjár var ein fyrilestur í Klaksvík sum æt "Síðsti pensiónisturin sløkkir". Í komandi viku verður framhald í Norðurlandahúsinum og eitur hesin fyrilesturin "Næsti super-pensiónisturin tømir kassan".
**Maður, 37 ár**

„Stemningurin innanhýsis í Fólkaflokkinum er ótrúliga behagiligur.
Rodmund Nielsen, sum ivaðist í síni luttøku í flokkinum, er nú sannførdur (Sosialurin)

Teir flestu av mínum javnlíkum, og eg sjálvur taldur við, byrjaðu at drekka sum 14 ára gamlir. Og seinni um 16 ára aldur vóru vit við í køssum hjá eldri, heilt til vit kundu bestilla sum 18 ára gamlir. At trúgva, at 18 ára aldursmark steðgar nakrari drekking, er fávit.
**Maður, 53 ár**

So er enn ein arbeiðsdagur farin - eri takksom fyri at hava arbeiði. Onkur sigur, tað gongur betur í Føroyum nú - kanska tey hava rætt. Í gjár vóru 2026 arbeiðsleys, og í dag eru 2025 arbeiðsleys!
**Kvinna, 33 ár**



Forboðssamfelagið er av tí ónda. Tað er tá hesar halleluja-rabarburnar fáa ov nógva makt. Skulu stýra okkara lívi og køva alt, sum vit halda verða spenanndi og áhugavert.
Ingi Sørensen sigur sína hugsan í Fólksins rødd (Kringvarpið)



Eg havi havt tað sera ringt. Eg sat bara í einum stóli og stardi út í tóman heim.
Sangarin Katie Melua tosar um, at hennara gjøgnumbrot sum sangari kostaði nógv (The Sun)